

# Kjallarin røkkur langt út í heim

**Nýggir fjarskiftismøguleikar hava givið fólki møguleika at arbeiða heima. Men fyri Edith og Kristoffur Mørkøre er heimaarbeiðsplássið nógv meira enn ein telda í einum horni. Við góðum evnum og góðum handilsskapi hava tey í kjallaranum heima við hús skapt eina success**

Tá ið húsbóndin er útlærdur málari og frúan hevur lært í timburhandli, so er tað kanska ikki løgið, at heimið er snøgt og lekkurt. Og hóast hetta eisini er arbeiðspláss hjá tveimum listafólkum við stóra L, so er einki listarligt kaos at hóma. Ein skrappur tónleikari flippar út niðri í kjallaranum, og penslar og lørift fylla eitt arbeiðsrúm uppiá, men alt húsið er samstundis so væl og hugnaligt innrættað, at tað er týðiligt at her er heimið ikki ofrað fyri arbeiðið.

Men hugnaliga heimi uppi í Hoyvík er nógv meira enn bara eitt vanligt heim. Longu sum smádrongur droymdi Kristoffur um, at hann skuldi eiga eitt tónleikastudio, tá hann varð stórur. Dreymurin gjørdist ein ætlan, og tá hann seinni fór til skips og síðani í læru, setti hann pengar av til komandi heim/studio. Fyri trimum árum síðani kundu hann og Edith so flyta í hús við bæði studio og atelier í kjallaranum.

### Gjørdu ávaringar til skammar

Tað skortaði ikki við ávaringum, tá ið Kristoffur fortaldi fólki um sínar ætlanir. Tónleikarar søgdu við hann, at hatta kundi ikki vera meira enn eitt ítriv, tí eingin hevði nakrantíð fingið slíkt at bera seg í Føroyum.

Tað fyrstu tíðina var kjallarin friðarligur. Kristoffur hevði fingið sítt studio, men kundarnir manglaðu. So fekk hann tíbetur høvi til at gera ein fløgu, og síðani hevur hann ikki havt ein stillan dag.

- Vit høvdu avtalað, at hann skuldi geva 100 prosent í tvey ár, og um tað ikki bar seg til ta tíð, kundi hann fáa sær okkurt afturat, og um tað framvegis ikki bar seg eftir fimm ár, máttu vit finna eina aðra loysn, greiðir Edith frá. Men tað gekk nógv skjótari og nógv betri, enn tey høvdu torað at vænta.

Fyri hálvum ári síðani víðkaði Kristoffur studio, tí hann og ein annar produsari løgdu saman. Hetta gjørdi, at Edith var noydd at flyta út, men tað hevði hon einki ímóti, tí hetta gav henni samstundi mót til at siga trygga leiðarastarvið frá sær og arbeiða fulla tíð við listini. Í dag hevur Edith atelier í kjallaranum hjá foreldrunum, men hevur framvegis eitt arbeiðsrúm við hús.

### Heim ella arbeiðspláss

Hóast tónleikabólkar til tíðir brúka studio til langt út á náttina, so órógvar tað ikki á nakran hátt friðarliga heimið, tí húsið er bygt til at hava buldraligar tónleikarar í kjallaranum.

- Húsið hevur dupult dekk við fleiri plátum, so her er væl og virðiliga ljóðisolerað, greiðir Kristoffur frá.

Flestu tónleikarar hava annað arbeiði við síðuna av, og tí eru upptøkutíðirnar ikki altíð millum átta og fýra, men Kristoffur leggur dent á, at hann ikki arbeiðir alla tíðina.

- Tá eg komi upp til náttúrða, so er dagurin liðugur, og eg fari ikki omanaftur uttan at spyrja Edith fyrst, sigur hann smílandi.



*Samanrenningin av list og handilsskapi sást aftur í kortunum, sum Edith hevur gjørt og selur til handlar kring alt landið. - Nú kenni eg marknaðin frá mínum fyrrverandi starvi, og eg visti, at tað manglaðu nøkur meira spennandi og hugnalig kort. Mær hevur altíð dámt væl at gera gandadeiggj, og so fann eg eitt stað á internetinum har eg kundi fáa myndirnar printaðar sum kort, greiðir Edith frá*





*Seinasta hálva árið hevur Edith havt úr at gera við listini. - Eg angri ikki eina løtu, at eg segði trygga starvið frá mær og kastaði meg út í hetta. Hon hevur eitt arbeiðsrúm heima, men eftir at Kristoffur hevur víðka um studio,hevur hon flutt sítt atelier út í kjallaraíbúð hjá foreldrunum*